


www.oljan.fo

**Jan Müller** 04 - 06 - 2012

# Nógv seismiskt virksemi millum Føroyar og Hetland

Bæði í føroyskum og bretskum sjógvi verður í løtuni skotin seismikkur, og komandi mánaðirnar verður virksemi økt munandi eitt nú vestan og norðan fyri Hetland. Stór seismikkfeløg sum TGS og CGG Veritas standa fyri umfatandi verkætlanum, sum hava til uppgávu at rudda slóð fyri komandi leiting og útbygging í hesum stóra økinum. Tað eru eisini kærkomin tíðindi, at Chevron, sum er fyristøðufelag á stóra Rosebank fundinum beint við føroyska markið, hevur kunnað myndugleikarnar í Bretlandi um, at tað er farið undir at gera umhvørviskanningar á havbotninum, sokallaðar seabed survey, sum eru í tráð við reglur fyri oljuvirksemi (Conservation of Habitats) frá 2001. Kanningarnar verða lidnar í august og fara fram í teiginum 213/27. Tað er her um leiðir, at Chevron, Statoil, Dong og OMV hava ætlan um at fara undir at risastóra útbygging. Hetta eru alt fyrireikingar til hesa risastóru útbyggingina av Rosebankleiðini, sum tá hon er útbygd, verður hetta tann oljuleiðin í bretskum øki, sum liggur tættast upp at føroyska markinum. Um somu tíð hevur CGG Veritas søkt bretsku myndugleikarnar, DECC um loyvi at skjóta 3D seismikk í einum øki, sum eisini liggur nær føroyska markinum. Hesar kanningarnar byrja í juni og taka 60 dagar. Longur norðari hevur TGS søkt DECC um at skjóta seismikk í einum stórum øki. Sum skilst botnar nógva seismiska virksemi í, at bretsku myndugleikarnir um ikki so langa tíð fara at lata oljufeløgunum nýggj leitiloyvi eitt nú vestan fyri Hetland. Eisini hevur lækkaði skatturin á leiting og útbyggingum vestan fyri Hetland sett gongd á áhugan at gera fleiri seismiskar kanningar í økinum.